## DAGSINS MEINING

# Samgonguómøguleikar

Seinasta veljarakanningin boðar ikki frá góðum fyri samgonguna. Veljarakanningar eiga altíð at verða tiknar við fyrivarni, men tá munurin millum tey, ið ynskja eina loysn innanfyri ríkisfelagsskapin, og tey, ið vilja loysa, er so stórur, sum hann var í seinastu veljarakanning, so átti samgongan at lisið skriftina á vegginum.

Sitandi samgongu er neyvan lív lagað eftir valið. Skuldi tað óvæntaða hent, at hon varðveitti meirilutan, so er stevið so út av lagi vánaligt, at ivasamt er, um somu flokkar klára at semjast um eitt nýtt samgonguskjal.

Um vit hugsa okkum, at valúrslitið verður sum seinasta veljarakanning spáar, nevniliga 8 mans í part til Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin, 5 mans til Fólkaflokkin, 2 til Miðflokkin og 1 til Sjálvstýrisflokkin, so eru ikki nógvir samgongumøguleikar. Um vit ganga út frá, at ein samgonga millum Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin er ein ómøguligheit, so ber eingin samgonga til uttanum Javnaðarflokkin. Hetta setir Javnaðarflokkin í eina sera áhugaverda lyklastøðu – ella rættari sagt kundi sett hann í eina áhugaverda lyklastøðu.

Nú er støðan tann, at Tjóðveldisflokkurin hevur brent sera nógvar brýr í seinastuni. Har man fyrr hevði hóvligar menn við róðrið, hevur man nú oddamenn í flokkinum, ið hava lagt seg út við alt og øll – innanfyri samgonguna sum uttanfyri. Torbjørn Jacobsen, ið er gjørdur til ein av oddamonnum í Tjóðveldisflokkinum styggir potentiellar samstarvsfelagar burtur við einum orðavali og ódámligum samanberingum, ið vit neyvan hava sæð í Føroyum, síðani Óli Breckmann var uppá tað ringasta í 80'unum.

Væntandi samstarvsviljin í Tjóðveldisflokkinum og breckmannski retorikkurin hjá onkrum av nýggju oddafiskunum í Tjóðveldisflokkinum átti at fingið teir meira hóvligu tjóðveldismenninir, hvørjir so verða eftir eftir valið, at hugsað seg eitt sindur um. Aftaná seinastu útmeldingarnar sær út sum, at ein breið semja kann finnast eftir valið millum allar flokkar uttan Tjóðveldisflokkin. Tjóðveldisflokkurin hevur konfronterað seg so langt út, at einasta loysn fyri hann er eitt eittflokkastýri. Tað er bara tann vansin, at teir hava ikki meira enn ein fjórðing av atkvøðunum. Floksleiðslan átti kanska at lagt sær orðini hjá tingformanni tess meira í geyma. Tað var í hvussu er greið tala um sín egna flokk.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Við Sambandsflokkinum fáa vit ein sjálvberandi búskap

**Tummas E. H. Joensen**
*Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Vit skulu stýra ábyrgdarfult, um tað so er við ella uttan blokkstuðul.

Sambandsflokkurin ásannar, at tað er umráðandi, at landsins fíggjarmegi verður væl umsitin, og at gjølla verður ansað eftir fíggjarviðurskiftunum hjá føroysku tjóðini. Hetta undirstrikar ta ábyrgdarkenslu, sum teir ráðandi í landinum eiga at vísa.

Øll umsitingin í landinum verður goldin við skattakrónum, so ella so, og skatturin má fyri alt í verðini ikki hækka. Tí skal henda stýringin av búskapinum útinnast ábyrgdarfult, um tað so er við ella uttan blokkstuðul.

Sambandsflokkurin vil arbeiða fyri, at vinnulívið fær best møguligar umstøður at virka undir. Her verður hugsað um bæði verandi, eins væl og nýggjar vinnugreinar.

**Vinnulívið og politikarin**

Sambandspolitikkur er ein politikkur, ið tryggjar føroyingum góð livikor. Hava vit eitt sunt og gott vinnulív, so fylgir alt annað búskaparligt eftir.

Tað einasta, sum ein politikari skal hava við vinnulívið at gera, er at hann skal skapa og betra um karmarnar. Politikarar skulu ikki vegna landið og vinnulívið sjálvt reka nakað vinnulív, nei politikarar skulu við lív og sál arbeiða fyri, at alt verður gjørt, fyri at gera umstøðurnar lagaligari fyri vinnulívið.

**Konjunkturjavnan**

Vit vita øll, at blokkstuðulin er eitt slag av konjunkturjavning, ið illa slepst undan hjá einum lítlum samfelagi sum Føroyum. Hetta er tað "normala" fyri okkum. Tó skulu vit altíð virka fyri, at tann føroyski búskapurin í mest møguligan mun byggir á eitt sunt, kappingarført vinnulív, ið er ført fyri at økja um framleiðsluna.

Ynskir tú eina Føroyska tjóð við sjálvberandi búskapi, skalt tú velja Sambandsflokkin til komandi val. Alt annað er uttanumtos. Tað hava hesi 4 seinastu árini so dyggiliga staðfest.

# Er skerjingin av blokkinum skilagóður ella skilaleysur politikkur?

**Johan Dahl**
*Vágur 07.03.2002*



Við útgangsstøði í ivaleyst bestu vinnuligu tíðum í Føroyum nakrantíð síðan vit fóru frá bóndasamfelagnum til fiskivinnusamfelag, hava landsins kosnu menn valt at skerja Ríkisveitingina við heilum 366 mió krónum.

Útgangstøði er, at vit framhaldandi koma at spinna gull av fiskivinnuni og eini komandi sera ivasamari oljuvinnu, og tískil koma at hava inntøkur nokk at bera nevndu minking.

Eg haldi, at tað er lítið hugsað um vælferðarsamfelagið Føroyar – tann vanliga føringin, mannin og kvinnuna á gøtuni og komandi ættarlið og teirra sosialu trygd framyvir, – tá ríkisveitingin verður skerd uttan himpr og uttan arða inntøku at seta ístaðin.

Ístaðin fyri at skerja blokkin við Kr. 366 mio. Pr. ár - kundu nevnda upphæddin verði brúkt til t.d.:

Tryggja øllum føringum eina góða eftirløn – við at latið tær 366 mio pr. ár farið til at hækka støðisfæðið í samhaldsfasta eftirlønargrunninum.

Innan 4 ár vildi hendan upphædd fyriuttan rentuinntøkur verið vaksin til Kr. 1.464 mio – altso næstan 1,5 milliard.

Rentan av hesi upphædd, um hon var sett í útlendsk Lánsbrøv hevði verið uml. 6% p.a. og hevði hetta givið ca. 310 mio afturat teimum 1.464 mio .

Hendan upphædd hevði avgreitt einhvørja diskussión um, hvussu pensiónsspurningurin skuldi loysast – hann hevði nevniliga verið loystur!

Ella vit kundu brúkt einans eitt ára nðurskerjing til til dømis at:

- Goldið nýggju suðuroyarferjuna og stóran part av havnaútbyggingunum til somu.
- Goldið komandi Norðoyartunnilin kontant
- Goldið 2-3 nýggj Ellis- og Røktarheim við eitt ára gjaldið.
- Givið okkara heilsuverkið neyðugu abøturnar og útbyggingar, sum sigast at krevja yvir milliardina.

Eg vil lata lesaran sjálvan døma um tað skilagóða í nevndu blokk skerjing.

Ein dáragerð er framd móti føroyka fólkinum, sum neyvan er til at rættað upp aftur – umframt at stórar byrðar er lagdar á komandi samgongu.

FULLVELDI FYRI EINHVØNN PRÌS er felagssangurin hjá sitandi samgongu.

Ver við til at skapað trivna og framburð í Føroyum í komandi tíðum – styðja SAMBANDSFLOKKIN til komandi løgtingsval.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til grein, sum Eyðolv Dimon hevði í Sosialinum 3 mars.

**Petur Kirke**

Í nevndu grein sær út til, at Eyðolv er bangin fyri átrúnaðarligum frískúlum. Eg má siga, at eg eri púra samdur við Eyðolv, so leingi talan er um talibanar, moon-rørsluna, Jim Jones og líknandi, og rokni eg við, at hesin óttin hjá honum stavar frá hesum rørslum. Tað, sum hann tíverri sær út til at gera skeivt, er at hann bólkar vanligar kristnar samkomur saman við hesum ekstremu sektunum, og hetta er heilt burturvið.

Bólkingin hjá Eyðolvi (í 2 bólkar av føroyingum) er eisini heilt burturvið, og tað er týðuligt, at Eyðolvur her sipar til Miðflokkin. Eftir útleggingini hjá Eyðolvi, so eru ALLIR føroyingar kristnir (ella meinar hann nakað annað við trúgvandi?), uttan kanska tey, sum eru í Miðflokkinum.

Hvussu hesin pástandurin skal útleggjast, kundi eg gott hugsa mær at fingi at vita?

Í mínari bíbliu stendur í hvussu er, at tað, at vera ein kristin, er at hava yvirgivið sítt lív til Harran Jesus. Tá ein yvirgevur seg til Jesus, so yvirgevur ein ikki bara ein part til hann, men ALT. Hetta má avspeglast á øllum økjum, eisini tá tað kemur til m.a. politikk og pengar.

Tað kann vera, at onkur hevur brúkt átrúnað sum amboð fyri at náa einum løgtings sessi, men hetta er ikki aðalmálið hjá Miðflokkinum. Um talan var um at finna amboð fyri at fáa ein løgtings sess, so rokni eg við, at Miðflokkurin hevði valt okkurt annað amboð, sum hevði givið fleiri atkvøður.

Aðalmálið hjá Miðflokkinum er at arbeiða fyri og verja tey kristnu lívsvirðini. Og sjálvandi ynskir Miðflokkurin at fáa so nógvar atkvøður sum møguligt, fyri at røkka hesum endamálið í so stóran mun, sum til ber.

Annars eri eg púra samdur við Eyðolv í, at Javnaðarflokkurin ikki hevði mist so nógvar atkvøður, um so er, at flokkurin er ímóti frískúlum, tí VERULEIKIN er, at flestu sokallaðu trúgvandi føroyingar ganga nógv meira uppí politikk enn kristindóm, tíverri.

Um so var, at tey sokallaðu kristnu í Føroyum tóku kristindóm framum, so hevði Miðflokkurin ivaleyst verið nógv tann størsti flokkurin í Føroyum. Hetta tí, at Miðflokkurin altíð hevur sett tey kristnu virðini fremst, og tað hevur ongin annar flokkur gjørt.

Tann síðsta viðmerkingin um frískúlarnar hjá Lívsins Orð vísir týðuliga tann væntandi kunnleikan, sum Eyðolv hevur, og hvørjum støði henda greinin hjá honum er á.

Hetta um, at skúlarnir læra, at sjúka er ein straffur frá Gudi er ein beinleiðis lygn, og er hetta júst sum Dánjal á Dul nevnir, forfylging, sum verður rikin ímóti kristnum samkomum, og sum vit tíverri heldur ikki eru frí fyri her á landi.

Um Eyðolv kendi nakað sum helst til Lívsins Orð, so hevði hann vita, at henda samkoma er beint øvugt kend fyri at læra, at Gud ynskir at grøða og hjálpa øllum menniskjum.

# Undir land

**Bill Justinussen**
*Miðflokkurin*



Nú er fullveldisskútan komin undir land av hesum túrinum. Málið við túrinum miseydnaðist, tí skiparin og stýrimaðurin settu hvør sína kós. Annar stevndi móti tjóðskaparligum frælsi, meðan ongin veit, hvar hin ætlaði sær. Úrslitið er, at skútan so at siga hevur ligið bakk allan túrin, meðan maðurin á dekkinum hevur arbeitt av grimd og fingið ikki so lítið av veiðu inn á dekkið. Nú riggast skal av, kunnu teir á brúnni bara semjast um eittans mál, og tað er at seta fulla ferð á motorin, áðrenn mynstrað verður av og næsta manning kemur umborð. Og tað er ikki smávegis , sum verður brúkt:

- undirsjóvartunnil Vágar
- undirsjóvartunnil Norðoyggjar
- nýggj Suðuroyarferja
- nýggjar íløgur á landi í sambandi við Suðuroyarferjuna
- nýtt Ellisheim
- nýggjur bygningur til landssjúkrahúsið
- skattalætti á 80 mill. kr.
- blokkniðurskurður á 1 milliard triðjahvørt ár

Harumframt er ein nýggjur Smyril á veg fyri 7-800 mill. kr., sum so ella so lutvíst skal gjaldast av føroyingum. Og uttan iva eru fleiri aðrar verkætlanir um at koma av bakkastokki. Alt hetta skal gjaldast samstundis sum

- rækjuflotin er í kreppu
- alivinnan hevur fingið týðandi afturstig
- fiskaprísirnir eru munandi lægri

Fíggjarlógin fyri komandi ár gevur longu nú hall, um framrokningarnar halda. Manningin á brúnni hevur fullkomiliga mist tamarhaldið á skútuni og kann, nær tað skal vera, renna á sker. Maðurin, sum hevur sitið fastur omaná peningaskrýninum allan túrin, hevur uttan iva verið fyri slíkum ágangi, at hann ikki hevur orkað at hildið tætt. Nú býta teir út í bæði stýriborð og bakborð uttan skil, tí skjótt mynstra teir av og ætla sær ikki við aftur næsta túr, tí útlitini fyri líknandi veiðu eru ikki júst tey somu.

Øll vilja vit hava íløgurnar framdar. Tær eru neyðugar fyri menningina av samfelagi okkara. Ongin er ímóti framburði og vælferð. Men íløgurnar skulu gerast við skynsemi og í mun til virksemið í landinum annars. At seta so nógv alment virksemi í gongd, samstundis sum vinnulívið manglar arbeiðsmegi, er øllum kunnugt skilaleyst.

Skilamaðurin Jógvan I. Olsen segði, at tað er ikki bara sum at siga tað at koma undir land, tí har er tað, skerini eru.

# Hvør skal gjalda fyri fulveldishugsjónina

**Hendrik Thomsen**



Gjøgnum alt hetta sjótt farna vælskeiðið, er tað bert fullveldismálið ið hevur haft áðhuga hjá samgonguni og Landssstýrinum.Tey sum ikki av fullum huga hava tikið undir við hesum máli. Og hava ditta sær at spurgt, hvat ið verður betri tá vit hava loyst okkum frá restini av ríkinum, hava veri skýrd afturhaldssinnaði.Men eingin hevur en sagt okkum og kunnað undirbygt hvat verður betri fyri vanliga føroyingin, eftir fulveldistøkuna. Tað einasta sum vit, við vissu vita er at í ár 2002 hevur hvør føroyin 8000 kr minni at liva fyri. Hetta er tað ið svarar til niðurskurin í blokkinum í ár. Um ikki brúk var fyri hesum pengum her í landinum, kundu teir verið nýttir at goldið landskassans skuld til statskassan .Men øll vita, at støðan í landinum á so mongum økjum ikki er betri en so, at vit saktans hava tørv á hesum peningi. Tað verður tí ein strævin uppgáva hjá komandi samgongu.Og føroya fólki, at rætta uppaftur, tað íð á láni hevur ligið. Samstundis sum blokkurin er skorin við nærum 400 milliónum.Tey ið skullu gjalda hendan meirkostna er tann føroyska verkafjøldin og eingin annar. Tey sum ynskja,at hendan gongd skal standa við og versna skullu velja ein av loysingarflokkunum.Tey sum ynskja trygg og stabil viðurskifti og innan ríkisfelagsskapin skullu sjálvandið velja Javnaðarflokkin.

# Ræðuligt einsemi

**1. partur**
**Hans Birgir Hansen**



Eg fari við hesum at avdúka eitt ræðuligt einsemi og fylgjurnar. Ætlan mín við hesi frágreiðing er at fáa greitt tykkum frá mongu syndarligum mannalagnum, ið tey einsamøllum í øllum aldri og samfelagsbólkum, koma út fyri í tí dagliga lívinum, og grundir fyri teimum og tær álvarsligu fylgjur, ið standast av ræðuligum einsemi. Hvat viðvíkur mannalagnu upp í fleiri bólkar, í mótgongd og viðgongd úti í landshúsarhaldinum.

Tó er tað ræðuligt, at menniskju við góðari mannalagnu persónliga gera gjøldur burturúr teimum við ringari mannalagnu, ið skaðar hesi fyri lívið, tá nógv einsamøll mistu tey, hesi vóru góð við.

Soleiðis er ídag í okkara samfeløgum úti í landshúsarhaldinum, tí eiga øll einsamøll ikki at hava samband við tey skaðafróðu, ið ikki vilja viðurkenna og virða okkum í tí dagliga lívinum um alt landi. Tað eiga øll einsamøll at gera sær púra greitt við at fáa samband við onnur einsamøll, ið eru í somu støðu, sum ein sjálvur/ur, hvat ið nógv royna ídag um alt landi í góðum verskapi og sosialari samveru. Tað eru nógv, ið liva í góðum fíggjarligum og sosialum korum, ið hava høvuðsleiklutin, at so nógv einsamøll koma at liva og virka í fátækradøminum, les og hoyr og síggj fremmand bløð og fjølmiðlar. Tað hevði alt verið ørðvísi um alt landi, um øll, ið hava góða mannalagnu settu seg inn í støðuna hjá teimum, ið ringa mannalagnu hava, tí tit læra nógv meira av teimum við praktisku lívsroyndunum enn øvugt. Tað hevur týdning at fáa skipað solidaritet ímillum menniskju, og at øll vísa forstáilsi og virðing fyri hvørjum øðrum, soleiðis sum vit eru skapt og skikkaði, ymisk, ið hava so nógv til felags. Gera vit ikki tað so elva vit hesi neyðars menniskju til at fremja drykkjuskap og kriminalitet, og lógloysi, ið rakar okkum øll, og samfelagið úti í landshúsarhaldinum, tí tit ikki vilja hjálpa teimum. Einsemi og at fáa samband við onnur menniskju er størsti og álvarsligi trupulleikin hjá øllum einsamøllum, ið førir til alt tað omanfyri nevnda og nógv afturat, ið ein kundi nevnt av fyribrigdum. Tað eru túsund av einsamøllum dreingjum, gentum, kvinnum og monnum, ið hava trupulleikar við at fáa samband við onnur menniskju, tí vit ikki vilja gera okkum greitt, hvussu nógv vit hava brúk fyri hvørjum øðrum. Men sum sag, alt hetta verður framt, tá ið tey mongu gerast kriminell nýta drykkjuskap og stoffir, ið førir tey út í tað meira álvarsama, tá vit lesa, hoyra og síggja fremmand bløð og fjølmiðlar. Tað kemst av tí, at øll hesi ikki hava tað nógv gott við seg sjálvi og familju, vinum og kenningum, ið førir til skilna teirra millum, tá vit ikki geva okkum fær um hvønn annan í tí dagliga lívinum, ið er ein veruleiki. Tað eru túsund av einsamøllum, ið enda sínar dagar í fongslum, á statssjúkrahúsum og á stovnum. Ein sjálvur hevur upplivað í Danmark og Føroyum fyrst í 70 árunum, hvat ein ikki hevði uppiborið. »Innisperraður.« Tað er alt annað enn stuttligt at uppliva tvangsinnleggjan og verða mental-kannaður av sálarfrøðingi og sálarlækna, tá ein skal venja seg til at vera innisperraður, ið leggur eitt ógvuliga stórt trýst á slík neyðars menniskju, ein upplivdi. Og tað at síggja og uppliva slíkt er ræðuligt, niðri og heima, og hvussu nógv verða likamliga og sálarliga niðurbrotin av slíkum umhvørvi og viðgerðum, tí tey komu sær út í kriminella umhvørvið, vit hava. Tað er eisini tí at hesi eru hóttandi, tá ið slík missa tamarhaldið á sær sjálvum, og hvørs likam og sálarlig veik menniskju kenna seg vera hótt av slíkum, ein upplivdi niri og heima fyrst í 70 árunum.